## Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi,
tá kæra kona og mamma okkara

**Anna Hansen**
Saltangará

andaðist og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

Ein serstøk tøkk skal ljóða til Heimarøktina.

**Hans Jacob, Ingvard og Jákup**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu,
tá okkara góði pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Erling Poulsen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Jónsvein Bech fyri troystarrík orð í kapellinum
á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Takk til Martin Restorff fyri vøkur orð í kirkjuni,
Magna Christiansen fyri vakran sang,
takk til sangarar og kirkjutænarar.
Takk fyri alla ta hjálp, sum veitt varð okkum
í samband við jarðarferðina.
Takk fyri peningagávu til KFUK.
Ein serlig tøkk til Sambýlið á Tvøroyri, takk fyri
umsorgan ta tíðina hann var hjá tykkum, tað fløvaði.

*Familjunnar vegna*
**Bjørghild og Mortan**

## Tøkk

Ein hjartans tøkk til tykkum, ið sýndu samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Poula Frida Heilmann**
Tvøroyri

doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólk og leiðslu á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Tøkk fyri blómur, kransar og fyri peningagávur
til Salem.
Ein serstøk tøkk til John í Skemmuni fyri góð
og troystarrík orð og til leiðsluna í Salem
fyri hjálpsemi í samband við jarðarferðina.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

Við ynski um eini gleðilig jól.

**Jette, Eyðun og Navja**
**Beinta, Kjartan, Niels Peter og Liam**

# Kliniskir vegleiðarar fingið prógv

Fríggjadagin 15. desember 2006 var próvhandan á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, tá Sjúkrarøktarfrøðingar, ið hava nomið prógv sum Kliniskir vegleiðarar, fingu prógv.

Skeiðfyriskipari og undirvísari á skeiðnum var Ása Róin, Master í professiónsmenning.



*Frá vinstru: Ása Róin, skeiðfyriskipari og undirvísari, Bodil Finnson, Mirjam Matras Heinesen, Frida Marsten, Ingrid Petersen, Jorie Josephsen, Elin Olsen, Jonna Schrøter Thomsen, Yvonne Drangberg, Helena Poulsen, Hjørdis Weihe, Sigrun Petersen, Elsebeth Sørensen, Elma Mikkelsen, Súsanna Krossteig Hansen, Eileen Djurhuus*

# Ferðsluvanlukka kostaði smádreingi lívið

**Ein ferðsluvanlukka í gjár, har ein lastbilur og ein persónbilur rendu saman á Hvítanesvegnum í Havn, kostaði einum 4 ára gomlum smádreingi lívið**

FERÐSLUVANLUKKA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár hendi ein ferðsluvanlukka á vegastrekkinum millum rundkoyringina í Hoyvík, og innkoyringina oman til Hvítanes. Ein lastbilur var á veg norð eftir og koyrir oman brekkuna. Í lastbilinum er bilførarin einsamallur. Ein persónbilur er á veg suður, og í hesum bilinum er ein familja. Tvey vaksin og tvey børn.

Av einhvørjari orsøk renna bilarnir frontalt saman. Hetta kostaði einum 4 ára gomlum dreingi lívið. Hini trý í persónbilinum, vóru saman við lastbilføraranum eisini flutt á Landssjúkrahúsið. Øll eru uttan fyri lívsvanda, men ymiskt er, hvussu stóran skaða tey hava fingið.

Løgreglan fekk fráboðan um vanlukkuna klokkan 16.25 í gjár. Beinanvegin varð vegurin avbyrgdur, og í nakrar tímar varð ferðslan leidd norður eftir Oyggjarvegnum.

Orsakað av støðuni hjá teimum, sum vóru við í vanlukkuni, hevur løgreglan ikki gjørt nakrar avhoyringar í málinum, og tí ber heldur ikki til hjá teimum, at siga nakað um orsøkina til vanlukkuna enn.

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við